# Landsliðsætlan SSF
# 2025-2029




Fyri tíðarskeiðið 1. september 2025 til 31. august 2029

Dagførd 24. januar 2026

# Inngangur

Landsliðsætlan SSF er okkara boð uppá tað, sum vit gera og ætla at gera í hesum tíðarskeiði, tá ið tað kemur til landsliðsvirksemi í Svimjisambandi Føroya.

Sjálvandi við fyrivarni fyri møguligum gloymskum, misskiljingum og villum, ið kunnu koma fyri, tá ið talan er um eina livandi skipan, har vit enntá meira enn so royna at spáa um framtíðina.

Landsliðsætlanin skal gjarna lýsa grundleggjandi landsliðsvirksemið, sum er tað, har SSF beinleiðis skipar fyri stevnuluttøku og venjingarlegum, umframt fyri møguligum øðrum, so sum útbúgving.

Afturat landsliðsætlanini er so eisini úrvalsætlanin, sum byggir omaná landsliðsætlanina.

Av tí at dagfestingar ofta ikki eru uppá pláss fyrr enn eitt hálvt til heilt ár áðrenn tær stevnur, sum vit fara til við landsliðunum, er trupult at dagfesta neyvt, fleiri ár fram í tíðina.

Men, skipanin er rættiliga føst, at t.d. OL er fjórðahvørt ár, HM annaðhvørt ár og EM so aftur annaðhvørt ár ímillum hesi, umleið somu tíð hvørt árið.

Tí ber til at leggja ætlanir fleiri ár fram í tíðina, sum alt annað líka, kunnu sigast at vera eftirfarandi.

Ætlanin er at dagføra landsliðsætlanina á hvørjum ári, so at talan verður um eitt rullandi skjal, við neyvari og neyvari upplýsingum so hvørt sum viðkomandi ár nærkast.

Afturmeldingar eru altíð vælkomnar, serliga um okkurt skuldi verið skeivt ella misskilt.

# Landsliðsætlan SSF 2025-2029

## Styttingar

Her er vanligu styttingarnar, fyri ymiskt sum verður nevnt í hesum skjali

**Felagsskapir**

- SSF - Svimjisamband Føroya
- ÍSF - Ítróttarsamband Føroya
- AQUA - World Aquatics (altjóða svimjisambandið)
- EA - European Aquatics (evropeiska svimjisambandið)
- NSF - Nordic Swimming Federation (norðurlendska svimjisambandið)
- NLSG - Nordic Life Saving Group (norðurlendski lívbjargingarbólkurin)
- ILSE - International Life Saving Federation - Europe (evropeiska lívbjargingarsambandið)
- ILS - International Life Saving Federation (altjóða lívbjargingarsambandið)

**Stevnur**

- DO - Danish Open
- EM/EML/EMS - EvropaMeistarastevnan, ofta tilskilað L fyri langgeil og S fyri stuttgeil
- EJM - Evropeiska JuniorMeistarastevnan
- EM U23 - Evropeiska Meistarastevnan fyri yngri seniorar (U23, tó eldri enn juniorar)
- HM/HML/HMS - HeimsMeistarastevnan, ofta tilskilað L fyri langgeil og S fyri stuttgeil
- NM/NJM - Norðurlendska Meistarastevnan og JuniorMeistarastevnan
- NMU - Norðurlendska Meistarastevnan fyri Ung

## Stjórn

Landsliðsvirksemið er enn beinleiðis undir starvsnevndini, íroknað at "starvsnevndin skal endaliga staðfesta allar úttøkur". Sí https://ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/reglugerd-um-uttoeku-og-kravtidir/

Orsøkin er serliga, at alt fíggjarligt hoyrir undir starvsnevndina, sum lýst í evstulóg SSF, harav landsliðsvirksemið er ein rættiliga stórur partur.

"Starvsnevndin hevur øll fíggjar- og fyrisitingarlig viðurskifti um hendi."
https://ssf.fo/felagsskapur/reglugerd/log-fyri-svimjisamband-foroya/

Men út yvir tað reint fíggjarliga, er tað fyri tað fyrsta tørvur á landsliðsvenjarum, og fyri tað næsta á fólki sum við servitan kunnu hjálpa okkum at menna og fáa samanhang í landsliðsvirksemið.

Tí settu vit í 2021 ein landsliðsvenjara, og síðani í 2023 tveir afturat til eitt landsliðstoymi, til at hjálpa okkum við sjálvum landsliðsvirkseminum, íroknað at meta um kravtíðarskipanir og úttøkur.

Til nú í 2025, varð loysnin omaná eitt umfar av fundum við høvuðsvenjarar og forfólk í feløgunum, at vit hava éin landsliðssamskipara við ábyrgd fyri eisini úrval, ið eisini kann vera landsliðsvenjari.

# Grundreglur og útbúgving í antidoping

Felags fyri øll sum ferðast við landsliðum SSF, er at tey skulu virða grundreglur ÍSF um ferðaløg, og gjøgnumføra útbúgving í antidoping frá Anti Doping Danmark ella World Anti Doping Agency.

SSF hevur mong ár brúkt, at altíð senda tveir venjarar/leiðarar av hvør sínum kyni við landsliðum okkara. Hetta til at tryggja bæði íðkarar og venjarar/leiðarar betri, ífall at okkurt skuldi verið.

SSF hevur minst líka leingi virkað fyri javnstøðu millum landsliðsíðkarar okkara, so at skilja, at tilboðini eru líka góð til bæði kynini, viðhvørt við lættari úttøkukrøvum til veikara kynið (m/k).

Landslið okkara eru altíð tryggjaði við ársvinnuferðatrygging frá Betri, sum burdi dekkað væl.

Hartil valdu vit, tá ið kravið um barnaváttanir varð innført, at allir venjarar/leiðarar skuldu hava reina barnaváttan, áðrenn teir kundu fara við landsliðum SSF. Óansæð aldur á íðkarunum.

Krøv til venjarar og leiðarar er lýst í okkara skipan til úttøku av venjarum og leiðarum.

Eitt nýtt sum væntandi nú er ávegis, er at World Aquatics og European Aquatics rættiliga skjótt fara at krevja, at venjarar til EM, HM og OL hava lokið serliga góðkend skeið.

# Viðkomandi reglugerðir

Hesar reglugerðir og skipanir eru beinleiðis viðkomandi fyri landsliðsvirksemi SSF:

Hjá Svimjisambandi Føroya

- Lóg fyri Svimjisamband Føroya
  - her m.a. um ábyrgd og heimild hjá starvsnevndini, at gera reglugerðir, skipa fyri og seta fólk
- SSF reglugerð um úttøku og kravtíðir
- SSF úttøkuskipan til eyka úttøkur
- SSF skipan til úttøku av venjarum og leiðarum
- SSF reglugerð um tænastuferðir

Hjá Ítróttasambandi Føroya

- ÍSF grundreglur um ferðaløg
- ÍSF reglugerð fyri stuðul til EM og HM kappingar
- ÍSF reglugerð fyri stuðul til altjóða kappingar uttanlands
- ÍSF reglugerð fyri Úrval

Hjá World Aquatics

- World Aquatics Constitution
  - her serliga um Rights of Members at luttaka á HM osfr.
- World Aquatics Competition Regulations
  - her serliga um Sports Nationality, Affiliation and Eligibility
- World Aquatics By-Laws
  - her serliga parturin um Autonomy

# Grundleggjandi úttøkuskipan

Úttøkuskipan SSF er í stuttum:

1. Starvsnevnd SSF setur landsliðssamskipara, -venjara(r) ella -toymi
2. Landsliðssamskipari/-venjara(r) ella -toymi gera uppskot til úttøkuskipanir
3. Starvsnevnd SSF góðkennir formliga úttøkuskipanirnar
4. Viðkomandi íðkarar royna at klára ásettu krøv í úttøkuskipanunum
5. Feløgini fráboða SSF, hvørji ið hava klára ásettu krøv í úttøkuskipanunum
6. Landsliðssamskipari, -venjara(r) ella -toymi gera innstilling til starvsnevnd SSF, til úttøku
7. Starvsnevnd SSF viðger innstillingarnar, og tekur formliga út viðkomandi íðkarar

Gjøgnumgangandi er talan um úttøku - tvs. eingin er sjálvskrivaður at luttaka, men øll skulu klára ásettu treytur, og er endaliga úttøkan tá enn altíð upp til starvsnevnd SSF.

Úttøkuskipanirnar verða, so vítt gjørligt, gjørdar í samráð við viðkomandi áhugapartar, so sum serliga starvsnevnd og feløg ÍSF, umframt gjarna við hoyring íðkaranevnd SSF, og líknandi.

Gev gætur, at úttøkan er fyri hvørja avbjóðing sær; ikki so at ein er við í øllum um éitt er klárað.

Eyka úttøka kann koma uppá tal, sum lýst í Úttøkuskipan til eyka úttøkur.

Landsliðssamskipari SSF hevur dagligu ábyrgdina av samskifti og fyrisiting í hesum sambandi.

Afturat úttøku av íðkarum, er skipan til úttøku av venjarum og leiðarum.

# Heildarkravtíðarætlan SSF

SSF skifti í 2024 til heildarkravtíðarætlan, til at gera skipanina einfaldari, og til at fáa greiðari samanhang millum kravtíðirnar til hesar ymisku avbjóðingarnar.

Grundleggjandi er skipanin ein stigi við vaksandi krøvum til úrslit máld í AQUA-stigum, tó so at møgulig harðari krøv frá fyriskiparum sjálvsagt eisini mugu røkkast, og har Oyggjaleikir eru øðrvísi.

Oyggjaleikir eru øðrvísi, tí at vit í mong ár hava havt eydnu við fyri stevnuna hørð krøv, sum eru meðaltíð av veikastu heiðursmerkjatíð frá trimum teimum seinastu Oyggjaleikum. Vanliga bronsa.

Dømi um møguligar harðar kravtíðir, eru t.d. í sambandi við HM á stuttgeil og langgeil, har altjóða svimjisambandið AQUA vanliga ásetur sínar egnu, rættiliga hørðu kravtíðir.

Onnur dømi eru í sambandi við luttøku á Danish Open og Bergen Swim Festival, har vit hava havt siðvenju at brúka donsku kravtíðirnar til Danish Open sum krav, eisini til Bergen Swim Festival.

Tankagongdin við heildarkravtíðarætlanini er, at tað skal vera samanhangur millum ymisku kravtíðirnar, so at talentini so líðandi fáa størri avbjóðingar, so hvørt sum tey mennast.

Hartil er ásetingar og fordømi nú frá World Aquatics, at ‘universality’ eykaúttøka til HM og OL skal vera út í frá AQUA-stig, tvs. tá ið svimjarar ikki hava klára ásettu kravtíðir, men verða tikin við kvotu.

Tað er ofta upp til SSF at áseta kravtíðirnar, og er tað tá helst heildarkravtíðarskipanin, sum verður brúkt. Men, viðhvørt eru krøv frá fyriskiparum til luttøkuna, sum vit tá mugu fyrihalda okkum til.

Verandi heildarkravtíðarætlan er víst á næstu síðu.

# Heildarkravtíðarætlan SSF - Talva

| AQUA-stig | Nál | Ung | Juniorar/U23 | Opin |
|---|---|---|---|---|
| 250 | Talent | Atlantic Open | Atlantic Open | Atlantic open |
| 275 | | | | |
| 300 | Bronsunál | | | FM |
| 325 | | | | |
| 350 | | | | |
| 375 | | | | |
| 400 | | | | |
| 425 | Bronsunál* (415) | Talentliðið | | |
| 450 | | | | |
| 475 | | | | |
| 500 | | | | |
| 525 | Silvurnál (530) | | Bruttohópur | Bruttohópur |
| 550 | | | | |
| 575 | | | | |
| 600 | | NMU | | BSF/DO |
| 625 | Silvurnál* (630) | | NJM (yngri) | |
| 650 | | | NJM (eldri) | |
| 675 | | | | NM |
| 700 | | | EJM | |
| 725 | Gullnál (730) | | EM U23 | World Cup |
| 750 | | | | EM |
| 775 | | | | HM |
| 800 | Gullnál* (790) | | | |
| 825 | | | | |

GG! Møguligar treytir frá fyriskiparum mugu sjálvsagt klárast eisini, sum viðkomandi fyri serliga HM.
GG! Oyggjaleikir eru ikki við á hesari talvu, tí at vit har brúka serliga skipan (bronsutíð frá seinast)

# Raðfesting av altjóða stevnum

SSF hevur greiða raðfesting av altjóða stevnum, vegna søgu, formligar skyldur og møguligan stuðul:

1. HM/EM/OL
2. Oyggjaleikir
3. EJM og EM U23
4. NM/NJM og NMU
5. Aðrar stevnur, so sum Danish Open

At Oyggjaleikir eru so mikið høgt uppi á listanum, skyldast ta søgu, vit hava við hesi stevnu.

# Stutt um hesar stevnur

## HM/EM/OL

HM og EM eru uppá skift, á stuttgeil í november/desember og á langgeil í juli/august. Til HM er sterkt ynski um regluliga luttøku, sum lýst í evstulóg AQUA, og AQUA stuðlar tí eisini fíggjarliga. Til EM er nakað minni stuðul frá EA, men tó so fíggjarstuðul, umframt at luttøka har styrkir fram ímóti HM. Hartil stuðlar ÍSF eisini væl, við serligari pulju til luttøku á EM og HM.

OL er ultimativa málið fyri okkum øll, at ein dag kunna luttaka og vónandi standa okkum væl á Olympisku Leikum. Sjálvsagt helst umboðandi Føroyar; men annars í øðrum lagi við verandi skipan, har íðkarar, sum klára krøv sum ásett av dønum, tá kunnu luttaka á OL við danska landsliðnum.

## Oyggjaleikir

Oyggjaleikir eru okkara OL fyri hópin, stutt sagt. Sjálvsagt arbeiða vit fram ímóti góðum avrikum á HM/EM/OL; men fer tann luttøkan mest sannlíkt altíð at vera avmarkað til nakrar heilt fáar luttakarar. Oyggjaleikir eru til samanberingar ein stevna, har tað er møguligt og gevur meining at luttaka við einum hópi, eisini vegna tann alsk sum føroyingar sum heild hava til hesar leikir.

## EJM og EM U23

EJM er har Pál Joensen veruliga gjørdi vart við seg á altjóða pallinum, við 3 gull í Beograd í 2008. Hetta er stevna á høgum stigi, sum evropeisku londini sum heild nýta til at menna sínar bestu íðkarar fram ímóti EM. Aftaná EJM er svimjarin formliga seniorur; men kom EM U23 so afturat í 2023, til teir yngstu seniorararnar, tí at lopið annars var so høgt til opnu kappingina á EM og HM.

## NM/NJM og NMU

NJM er norðurlendsk fyrireikingarstevna til EJM, íroknað at aldursbólkurin er neyvt hin sami sum til EJM næsta ár. NM kom afturat í 2011, nakað sum EM U23 til at hava tilboð til serliga teir yngru seniorarnar, vegna lopið frá junior til opna kapping.

## Aðrar stevnur

Aðrar stevnur er serliga Danish Open, tí at hendan stevna ofta er týdningarmesta úttøkustevna hjá dønum, til summarstevnurnar so sum NMU, EJM, EM U23, EM, HM og OL.

Av tí at vit enn bara kunnu luttaka á OL gjøgnum donsku skipanina, meta vit tað hava stóran týdning at luttaka á hesi stóru úttøkustevnu hjá teimum, til at okkara skulu kenna til støði og skipan har.

Í nøkur ár varð Danish Open rakt av avbjóðingum við verkfalli og hallartrupulleikum og øðrum, sum gjørdi, at vit tá ið staðin luttóku á Bergen Swim Festival, tó enn við Danish Open sum mátistokk.

Afturat hesum, kunnu aðrar stevnur koma uppá tal, í tann mun sum tað fæst at rigga við fígging og kalendara okkara. Her í seinastuni serliga Sumarmót Íslands og World Cup stevnurnar.

Nú til í 2025, royndu vit at fyriskipa felags luttøku á Reykjavík International Games 2025, við egingjaldi. Tíverri vóru vit í so seint úti við teirri ætlanini, og varð hon tí av ongum.

Ístaðin varð nakað líknandi gjørt til Danish Open 2025, har SSF stuðlaði heldur enn at skipa fyri. Tað riggaði fyri so vítt fínt fyri okkum í SSF, men ynskja feløgini at vent verður aftur til at SSF skipar fyri.

Og so royndu vit okkum fyri fyrstu ferð við luttøku á EM í Open Water, eisini nú í 2025, sum eydnaðist rættiliga væl. Tað er nakað heilt annað, og tí neyðturviliga enn á royndarstøði.

# Hóparnir

SSF arbeiðir vanliga við fylgjandi landsliðshópum, har aldursbýti í ung, juniorar og seniorar er vegna tilsvarandi aldursbólkar hjá World Aquatics, European Aquatics og Nordic Swimming Federation.

- **Talent** eru evnaríkir svimjarar (ung og juniorar) nær kravtíðum til altjóða stevnur
- **Ung** eru svimjarar sum fylla 13 ella 14 ár í kalendaraárinum
- **Juniorar** eru svimjarar sum fylla millum 15 og 18 ár í kalendaraárinum
- **U23** eru ungir seniorar sum fylla millum 19 og 23 ár í kalendaraárinum
- **Seniorar** eru svimjarar sum fylla 24 ár ella meira í kalendaraárinum
- **Opin** kapping er tá ið einki aldursmark er, tó minst 14-15 ár til OL, HM og EM

Undantøk kunnu koma fyri, t.d. um onkur altjóða stevna hevur øðrvísi aldursbólking.

# SSF landsliðsætlan fyri 2025

Her er ætlanin í 2024 fyri SSF-stevnur og venjingarlegur SSF í 2025, við tillagingum

| Ferðadagar | Tiltak | Talent | Ung | Junior | U23 | Senior |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ~~(jan)~~ | ~~Felags luttøka á RIG 2025 v/egingjaldi~~ | ~~✔~~ | ~~✔~~ | ~~✔~~ | ~~✔~~ | ~~✔~~ |
| (feb) | Talentlandsliðslega | ✔ | | | | |
| (mar) | Landsliðslega (Danish Open) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| 4 - 9 apr | Danish Open í Bellahøj (5 - 8 apr) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| 24 mai | Landsliðslega (HM, NMU, EJM, U23) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| 26 mai - 1 jun | EM í Open Water (28 - 31 mai) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| 27 - 30 jun | SMÍ í Íslandi (28 - 29 jun) | ✔ | ✔ | ✔ | | |
| 23 - 29 jun | EM U23 í Slovakia (26 - 28 jun) | | | | ✔ | |
| 29 jun - 7 jul | EJM í Slovakia (1 - 6 jul) | | | ✔ | | |
| 4 - 6 jul | NMU í Tórshavn (5 - 6 jul) | | ✔ | | | |
| 11 - 19 jul | Oyggjaleikir á Orkney (14 - 17 jul) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| 20 jul - 5 aug | HM í Singapore (27 jul - 3 aug) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| 5 - 7 sep | SSF+SSÍ landsliðslega í Havn (2 dg) | | ✔ | ✔ | | |
| ~~(okt)~~ | ~~(World Cup í USA/Kanada) (3 dg)~~ | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| ~~(nov)~~ | ~~Landsliðslega (NM/NJM)~~ | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| 27 nov - 1 des | NM/NJM í Íslandi (28 - 30 nov) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| 30 nov - 8 des | EMS í Lublin, Póllandi (2 - 7 des) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |

**Viðmerkingar**

HMJ var hin 19. til 24. august í Otopeni (Bucharest), Rumenia, uttan føroyska luttøku
Hetta árið var eisini Games of the Small States of Europe í Andorra
Vit luttóku fyri fyrstu ferð á EM í Open Water, sum lýst omanfyri

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
LEN - European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)
International Life Saving Federation (ILS)

# SSF landsliðsætlan fyri 2026

Her er ætlanin í 2025 fyri SSF-stevnur og venjingarlegur SSF í 2026

| Ferðadagar | Tiltak | Talent | Ung | Junior | U23 | Senior |
|---|---|---|---|---|---|---|
| (feb) | Talentlandsliðslega | ✔ | | | | |
| (mar) | Landsliðslega (Danish Open) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (apr) | Danish Open í Bellahøj (16 - 19 apr) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (mai) | Landsliðslega (EM, NMU, EJM) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jun) | SMÍ í Íslandi (27 - 28 jun) | ✔ | ✔ | ✔ | | |
| (jun) | NMU í Norgi (29 - 30 jun) | | ✔ | | | |
| (jul) | EJM (5 - 12 jul) | | | ✔ | | |
| (aug) | EM OW í París (4 - 8 aug) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (aug) | EM í París St Denis (10 - 16 aug) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (sep) | SSF+SSÍ landsliðslega í ISL (2 dg) | | ✔ | ✔ | | |
| (sep) | (World Cup á Silkivegnum) (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (nov) | Landsliðslega (NM/NJM) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | NM/NJM í Litava (4 - 6 des) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | HMS í Kina (1 - 6 des) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |

**Viðmerkingar**

World Cup verður á Silkivegnum (Baku/Tashkent/Astana) í 2026, vit hava stuðulsjáttan til luttøku her
Vit hava hinvegin fingið noktað játtan til EM í Open Water

# SSF landsliðsætlan fyri 2027

Her er ætlanin í 2025 fyri SSF-stevnur og venjingarlegur SSF í 2027

| Ferðadagar | Tiltak | Talent | Ung | Junior | U23 | Senior |
|---|---|---|---|---|---|---|
| (feb) | Talentlandsliðslega | ✔ | | | | |
| (mar) | Landsliðslega (Danish Open) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (apr) | Danish Open í Bellahøj (15 - 18 apr) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (mai) | Landsliðslega (HM, NMU, EJM, U23) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jun) | SMÍ í Íslandi (2 dg) | ✔ | ✔ | ✔ | | |
| (jun ella aug) | EM U23 (3 dg) | | | | ✔ | |
| (jul) | EJM (6 - 11 jul) | | | ✔ | | |
| (jul) | NMU (3 dg) | | ✔ | | | |
| (jul) | Oyggjaleikir í Føroyum (4 - 8 jul) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jul) | HM í Budapest, Ungarn (10 - 18 jul) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (sep) | SSF+SSÍ landsliðslega í FRO (2 dg) | | ✔ | ✔ | | |
| (sep) | (World Cup í Berlin) (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (nov) | Landsliðslega (NM/NJM) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | NM/NJM (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | EMS (6 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |

**Viðmerkingar**

Legg til merkis, samanfall millum Oyggjaleikir og ætlaða EJM, og HM 2027 beint aftaná
EM U23 verður mest sannlíkt partur av European Games 2027 í Istanbul, í juni ella august
HMJ verður vælsagtans eisini, hetta árið, allarhelst nakað úti í august mánaða
Hetta árið er eisini Games of the Small States of Europe í Monaco

# SSF landsliðsætlan fyri 2028

Her er ætlanin í 2025 fyri SSF-stevnur og venjingarlegur SSF í 2028

| Ferðadagar | Tiltak | Talent | Ung | Junior | U23 | Senior |
|---|---|---|---|---|---|---|
| (feb) | Talentlandsliðslega | ✔ | | | | |
| (mar) | Landsliðslega (Danish Open) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (apr) | Danish Open í Bellahøj (4 dg) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (mai) | Landsliðslega (EM, NMU, EJM) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jun) | EM á langgeil (7 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jun) | SMÍ í Íslandi (2 dg) | ✔ | ✔ | ✔ | | |
| (jul) | EJM (6 dg) | | | ✔ | | |
| (jul) | NMU (2 dg) | | ✔ | | | |
| (jul) | OL í Los Angeles (8 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (sep) | SSF+SSÍ landsliðslega í ISL (2 dg) | | ✔ | ✔ | | |
| (sep) | (World Cup í Berlin) (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (nov) | Landsliðslega (NM/NJM) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | NM/NJM í Føroyum (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | HMS (6 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |

**Viðmerkingar**

**SVIMJISAMBAND FØROYA**
Faroe Islands Aquatics Federation (FRO)
Fédération des Îles Féroé de Natation

Limaskapur/Affiliation:
Ítróttasamband Føroya (ÍSF)
Nordic Swimming Federation (NSF)
LEN - European Aquatics (LEN)
World Aquatics (AQUA)
International Life Saving Federation (ILS)

# SSF landsliðsætlan fyri 2029

Her er ætlanin í 2025 fyri SSF-stevnur og venjingarlegur SSF í 2029

| Ferðadagar | Tiltak | Talent | Ung | Junior | U23 | Senior |
|---|---|---|---|---|---|---|
| (feb) | Talentlandsliðslega | ✔ | | | | |
| (mar) | Landsliðslega (Danish Open) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (apr) | Danish Open í Bellahøj, Danmark | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (mai) | Landsliðslega (HM, NMU, EJM, U23) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jun) | SMÍ í Íslandi (2 dg) | ✔ | ✔ | ✔ | | |
| (jun) | EM U23 (3 dg) | | | | ✔ | |
| (jul) | EJM (6 dg) | | | ✔ | | |
| (jul) | NMU (3 dg) | | ✔ | | | |
| (jul) | Oyggjaleikir á Man (4 dg) | | ✔ | ✔ | ✔ | ✔ |
| (jul) | HM í Budapest, Ungarn (8 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (sep) | SSF+SSÍ landsliðslega í FRO (2 dg) | | ✔ | ✔ | | |
| (sep) | (World Cup í Berlin) (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (nov) | Landsliðslega (NM/NJM) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | NM/NJM (3 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |
| (des) | EMS (6 dg) | | (✔) | ✔ | ✔ | ✔ |

**Viðmerkingar**

HMJ verður vælsagtans eisini, hetta árið, allarhelst nakað úti í august mánaða

Hetta árið er eisini Games of the Small States of Europe í Luxembourg